Álit

í

løgtingsmáli nr. 19/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (mvg frítøka fyri epli, grønmeti og barnablæur og broyttar mvg-reglur fyri brúktar leigubilar- fylgilógaruppskot til FLU 2026)

Landsstýriskvinnan í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 30. september 2025, og eftir 1. viðgerð 21. oktober 2025 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. og 30. oktober og 21. november 2025.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Bilasølufelagið, Ferðavinnufelagið, bilaleigufyritøkurnar ComeNorth.fo, Rent.fo, 62°N Bilaleiga, RentYourCar.fo og Arctic.fo, Handilsvinnufelagið, Veltuna, Búskaparráðið, landsstýriskvinnuna í uttanríkis- og vinnumálum, Sirið Stenberg, saman við Kappingareftirlitinum og landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við TAKS.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Eyðgunn Samuelsen, Ingilín D. Strøm, Dennis Holm og Hanna Jensen) hevur hesar viðmerkingar:

Uppskotið snýr seg um at lætta um í gerandisdegnum hjá fólki við at lækka prísin á gerandisvørunum eplum, grønmeti og smábarnablæum við at frítaka hesar vørur fyri meirvirðisgjald. Uppskotið snýr seg eisini um at broyta mvg-frádráttin fyri leigubilar fyri at javnstilla sølu av leigubilum við aðra brúktbilasølu, t.d. at innflyta brúktar bilar.

Sambært galdandi lóggávu er søla av eplum, grønmeti, undir hesum frystum grønmeti, og blæum til børn, meirvirðisgjalds skyldug. Sambært galdandi lóggávu kann seljari av leigubili draga 60.000 kr. frá í sambandi við sølu av leigubili.

Undir viðgerðini er komið fram, at tað altíð er eitt ivamál, um tað ger nakran mun yvirfyri brúkaranum at frítaka vørur fyri meirvirðisgjald. Kappingareftirlitið hevur undir hoyringini í nevndini greitt frá, at vit hava ikki fullkomna kapping í Føroyum, og tí er ongin trygd fyri, at mvg-frítøka fult og heilt kemur brúkaranum til góðar.

Handilsvinnufelagið hevur ikki yvirskipað nakra meining um, hvørt vørur skulu frítakast fyri mvg, men hevur tó víst á, at mvg antin skal verða har ella verða strikað, tvs. eingin millumvegur. Víst hevur eisini verið á, at broytingarnar fara at hava við sær, at prísurin fer niður í fyrstani, men at

ongin trygd er fyri, at hetta fer at verða varandi, tí tað eru eisini viðurskifti uttanífrá, sum hava ávirkan á prísin.

Búskaparráðið hevur víst á, at tá man velur at strika mvg-ið á útvaldum vørum, so rakar man øll. Víst hevur eisini verið á, at hendan frítøkan av mvg kann hava ávirkan á heilsuna hjá fólki og á útreiðslurnar til heilsuverkið. Búskaparráðið hevur eisini víst á, at alt eftir hvat man vil, so eru tað nógv neyv amboð, sum kunnu brúkast, um man vil raka ávísar málbólkar í samfelagnum.

Spurningurin um umsitingarligar avleiðingar av at ávísar vørur verða frítiknar fyri mvg hevur eisini verið umrøddur undir hoyringunum. Handilsvinnufelagið hevur víst á, at tað er ivasamt, um tað fer at hava umsitingarliga ávirkan, men sannlíkt fer tað at ávirka teir smæstu handlarnar, sum ikki hava samankoyrdar telduskipanir millum kassa og bókhald; talan er tó um heilt fáar handlar. TAKS hevur greitt frá, at hvørki hesin parturin av uppskotinum ella tann um at broyta mvg-frádráttin fyri leigubilar fer at hava nakrar umsitingarligar avleiðingar av týdningi fyri stovnin.

Tá tað kemur til partin um at broyta mvg-frádráttin fyri leigubilar, hevur Bilasølufelagið undir hoyringini heitt á Løgtingið um ikki at fremja broytingina, og víst á, at tað var betri, at verandi lóggáva varð varðveitt. Bilasølufelagið hevur víst á, at verður lóggávan broytt, førir hetta við sær, at bíligu leigubilarnir ikki verða seldir í Føroyum, men fluttir av landinum, og at landskassin tí fer at missa tíggjutals milliónir krónur í inntøku heldur enn at fáa eina meirinntøku, sum víst annars verður á í uppskotinum frá Fíggjarmálaráðnum.

Fíggjarmálaráðið hevur undir hoyringini viðmerkt hetta og víst á, at fortreytin fyri roknistykkinum hjá Bilasølufelagnum er, at samlaða bilasølan í Føroyum fer at minka við teimum út við 450 leigubilum, sum Bilasølufelagið væntar fara at verða seldir av landinum, og hesa fortreyt metir Fíggjarmálaráðið ikki vera haldbara.

Umboð fyri bilaleigufyritøkur hava undir hoyringini víst á, at tað fer at fáa stórar avleiðingar, um lógin verður samtykt við afturvirkandi kraft á verandi leigubilar, sum eru komnir inn undir teimum treytum, sum eru í galdandi lóggávu. Verður lóggávan broytt fyri leigubilarnar, sum longu eru skrásettir og hava virkað eftir verandi skipan, so hava fyritøkurnar handlað út frá skeivum fortreytum, tá teir hava ásett leigukostnaðin fyri bilin, tí mvg-frádrátturin hevur ávirkan á leigukostnaðin.

Umboð fyri bilaleigufyritøkur og Ferðavinnufelagið hava undir hoyringini víst á, at broytingin í mvg-frádráttinum fyri leigubilar helst fer at føra við sær, at kostnaðurin av at leiga leigubil í Føroyum fer upp. Víst hevur eisini verið á, at tað frammanundan er dýrari at leiga leigubilar í Føroyum samanborið við grannalond okkara. Hesin spurningur hevur eisini verið umrøddur við landsstýriskvinnuna í fíggjarmálum, sum staðfesti, at tað er dýrt at keypa bilar í Føroyum, og sum setti spurnatekin við, hví landið skal veita stuðul, so at ferðafólk skulu fáa bíligari leigubilar, meðan tey ferðast í Føroyum.

Meirilutin tekur undir við at frítaka eplir, grønmeti og smábarnablæur fyri mvg. Kostnaðarstøðið í samfelagnum er seinastu árini hækkað munandi, og er mvg-frítøkan ein liður í miðvísa arbeiðinum at lætta um gerandisdagin hjá fólki. Frítøkan av mvg fer at lækka prísin á ávísum gerandisvørum, og legst hetta afturat skattalættanum og lønarlyftinum, sum vórðu framd í 2023 og 2024.

Meirilutin tekur eisini undir við at broyta mvg-frádráttin fyri leigubilar, soleiðis at sølan av leigubilum verður javnsett við aðra brúktbilasølu. Tó verður ein skiftisregla gjørd, so at verandi leigubilar ikki verða ávirkaðir av ætlaðu broytingini í meirvirðisgjaldslógini. Tað merkir, at bilar, sum eru skrásettir

sum leigubilar fram til 31. des. 2025, framvegis kunnu fáa mvg-frádrátt upp til 60.000 kr. við víðarisølu.

Sambært Fíggjarmálaráðnum verður skiftisreglan mett at hava avmarkaða fíggjarliga ávirkan og broytir ikki viðmerkingarnar til upprunauppskotið.

Við hesum viðmerkingum setir meirilutin fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 2 verður orðað soleiðis:

"§ 2

Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.
Stk. 2. § 1, nr. 1 er ikki galdandi fyri akfør, sum eru skrásett sum leiguakfør áðrenn 1. januar 2026. Fyri hesi leiguakfør eru tær áðurgaldandi reglurnar galdandi."

Viðmerkingar:
Sett verður inn ein skiftisregla sum stk. 2. Virknaðurin av skiftisregluni er, at leigubilar, skrásettir áðrenn 1. januar 2026, framvegis kunnu verða seldir við frádrátti á í mesta lagi 60.000 kr. treytað av, at akfarið antin hevur havt í minsta lagi 10 ymiskar leigarar, hevur koyrt í minsta lagi 8.500 km og hevur verið skrásett í minsta lagi 6 mánaðir, ella hevur verið skrásett í minst 3 ár.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Beinir Johannesen, Magnus Rasmussen og Steffan Klein Poulsen) hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at lætta um gerandisdagin hjá borgarunum. Hetta skal gerast við at lækka prísin á gerandisvørunum eplum, grønmeti og blæum til børn. Hetta skal gerast við at frítaka hesar vørur fyri mvg.

Eisini er endamálið við uppskotinum at broyta mvg-frádráttin fyri leigubilar. Hetta er ein inntøka til landskassan, sum samgongan hevur í hyggju at fáa.

At lætta um gerandisdagin hjá føroysku borgarunum er bæði skilagott og neyðugt.

Dýrari og dýrari gerandisdagur rakar øll í Føroyum hart og ikki sæst fyri nakrari broyting til tað betra heldur.

Høgu prísirnir á matvørum og øðrum gerandisvørum, umframt høgir bústaðarprísir, gera tað trupult at fáa endarnar at røkka saman.

Fíggjarliga byrðan ger tí dagligdagin hjá familjum sera truplan, og tí er neyðugt at tryggja føroysku familjunum betri livikor.

At betra um livikorini kann gerast á fleiri ymiskar mátar, men minnilutin metir ikki, at mvg-frítøka av hesum útvaldu vørunum er tað rætta at gera. Við hesi broyting, so fáa øll – bæði tey, sum nóg illa fáa endarnar at røkka saman og tey vælbjargaðu – lut í hesi mvg-frítøku. Hetta heldur minnilutin ikki vera rætt – tað vendir sosialt skeivt.

Hoyringarnar í málinum hava víst, at flestu tala ímóti hesi ætlan.

Minnilutin mælir heldur til málrættað at tryggja barnafamiljunum í Føroyum betri livikor, og tað gerst best við øktum barnafrádrátti, og kundu tí t.d. pengarnir, sum hendan ætlan kostar – einar 22 mió. kr. – heldur verið brúktir til øktan barnafrádrátt.

Um meiningin er at raka aðrar samfelagsbólkar enn barnafamiljurnar, so kann hetta eisini gerast við meiri málrættaðum tiltøkum, heldur enn at geva øllum føroyingum og enntá ferðafólkum ein mvg-lætta.

Tá tað kemur til ætlanina at broyta mvg-frádráttin fyri leigubilar, so er minnilutin ivasamur um, at hetta fer at geva ta væntaðu inntøku, sum lagt verður upp til í uppskotinum, einar 15 mió. kr.

Upplýst er fyri nevndini, at hetta fer sannlíkt at ávirka á tann hátt, at leigubilarnir verða ov dýrir at selja í Føroyum, og tað fer at føra við sær, at sølan verður flutt til útlandið, og harvið fær landskassin hvørki mvg ella avgjøld.

Eisini er upplýst nevndini, at fyriliggjandi uppskot eisini fer at fáa stórar avleiðingar, um tað verður samtykt. Orsøkin er, at verandi leigubilar eru komnir inn undir teim treytum, sum eru í galdandi lóggávu.

Verður lóggávan broytt fyri leigubilar, sum longu eru skrásettir og hava virkað eftir verandi skipan, so hava fyritøkurnar handlað út frá skeivum fortreytum, tá tær hava ásett leigukostnaðin fyri bilin, tí mvg-frádrátturin hevur ávirkan á leigukostnaðin.

Ivasamt er, hvørt ætlanin hjá meirilutanum við skiftisregluni er nóg mikið fyri at koma hesi avbjóðing til lívs.

Samanumtikið, so eru fleiri ivamál við hesi ætlan at broyta mvg-frádráttin fyri leigubilar. Heldur enn at samtykkja hetta við mvg-frádráttinum, so átti landsstýrið heldur at nágreinað fyrimunir og møguligar vansar við verandi skipan, áðrenn farið verður til verka at broyta hesa skipan. Eisini er neyðugt – væl og virðiliga – at kenna allar avleiðingar av eini slíkari broyting, sum nú ætlanin er at gera, og tað dugir minnilutin ikki at síggja skal vera støðan sum er. Óvissan er stór. Óvissan um nøkur meirinntøka kemur inn, ella um landskassin í roynd og veru fær minni inn, enn hann fær í dag, ger tað, at stórt spurnartekin má setast við, um uppskotið yvirhøvur hongur saman fíggjarliga.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 26. november 2025

Eyðgunn Samuelsen forkvinna	Beinir Johannesen næstformaður	Ingilín D. Strøm
Dennis Holm	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	